# HALDIÐ SOSIALIN



**400,-** um ársfjórðingin

- sparið **450,-**

í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Telefon nr.: ____________________

Undirskrift: ____________________

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

---

Innlendismálaráðið

## Stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum,

- sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
- sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella -avmarkandi
- sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
- sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella náttúruviðurskifti.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð sum fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 21. juni 2004.

---

Innlendismálaráðið

## Stuðul av játtanini til frama fyri viðarvøkstur

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla viðarvøkstri fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir umframt verja ímóti jarðarmáan.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð sum fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 21. juni 2004.

---



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MAI 2004**

## SKRÁIN VIKA 21–22

**Leygardagur 22. mai**

**Kl. 19.30** **Stjørnubreytin 2004 (FO)**
Evnarík ungfólk framføra tónleik og sang. Fyrirskipari er Pegasus
Atgongumerki á kr. 125.- eru at fáa í Húsinum og Kunningarstovuni í Havn.

**Leygardagur 29. mai**

**Kl. 16.00** **Konsert við Siloa Kórinum í Fuglafirði.**

**Sunnudagur 30. mai** **Hvítusunnudag er stongt.**

**Mánadagur 31. mai** **2. Hvítusunnudag er stongt.**

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

---

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

---



Runavíkar kommuna søkir eftir

## Leiðara til heim fyri minnisveik

Søkt verður eftir leiðara til heim fyri minnisveik til setan skjótast gjørligt.

Endamálið hjá heiminum er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Í Eysturoy hava vit ikki royndir við serstøkum heimum fyri minnisveik. Tí verður neyðugt, at bróta upp úr nýggjum og menna eina tilvitaða umsorgan fyri minnisveikum.

Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum dugnaligum leiðara við vitan um og áhuga í støðuni hjá minnisveikum fólki. Umráðandi er, at viðkomandi hevur hug og hegni at leiða, og er fúsur at taka av nýggjum avbjóðingum.

Við tilvísing til sosialu deild hevur leiðarin ábyrgd av:

- at leiða og tilrættisleggja arbeiðið á heiminum
- at reka heimið innanfyri ásetta fíggjarkarmin
- saman við upptøkunevndini at standa fyri visitatión av búfólki til heimið
- at fáa í lag samstarv við stovnar, skipanir og onnur, ið hava týdning fyri virkisøkið hjá heiminum
- at standa fyri fakligari menning av starvsfólkum
- starvsvenjing hjá lesandi og næmingum.

Vit vænta at leiðarin:

- hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- hevur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur ella líknandi útbúgving
- hevur víðari útbúgving ella serútbúgving innan demensøkið
- hevur leiðsluroyndir/royndir innan primeru heilsutænastuna
- evnar at samstarva bæði við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur royndir í og evni til at menna starvsfólk
- hevur kunnleika til teldu.

Setanar og lønartreytir:
Lønin er sambært sáttmála millum viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið ella Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

Runavíkar Kommuna
Att.: Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðari
Heiðavegur 26, Postboks 139
FO-600 Saltangará

*Umsóknarfreist: Mánadagin 7. juni 2004 kl. 12:00.*

***Heimið á Mýrunum***
*Runavíkar kommuna hevur við stuðli frá Almannamálaráðnum keypt Vistarheimið við Toftavatn og hevur síðani umbygt og umvælt heimið. Í samráð við Almannamálaráðið er avgjørt at heimið skal veita bútilboð til minnisveik fólk úr Runavíkar kommunu og Eysturoy.*

*Á heiminum er pláss fyri 8 minnisveikum fólkum. Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til búfólk ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.*



Runavíkar Kommuna
Heiðavegur 26 FO-600 Saltangará
Tel. 417000 Fax 417001 • E-mail: runavik@runavik.fo